## VIÐMERKINGAR

# Skal eittans fakfelag seta dagsskránna í heilsuverkinum frameftir?

VEGNA NEVNDINA
Í ALMANNA- OG
HEILSURØKTARAFELAGNUM
Majbritt Mohr,
forkvinna

Í sambandi við at visjón 2015 er løgd fram fyri almenningin við millum annað egnari heimasíðu, eru mong føgur orð at lesa, og mangar frálíkar ætlanir eru stungnar út í kortið.

Visjónin um vælferð er sett upp í 12 punkt. Burtur úr hesum kunnu vit nevna vælferðarráð, framtíðar eldrarøkt, heildarpsykiatriska ætlan og framtíðar heilsuverk. Fert tú inn at leita undir "*framtíðar heilsuverk*", stendur: "*settur verður ein skjóttarbeiðandi arbeiðsbólkur at skriva frágreiðing um tað primera heilsuverkið, og hvussu hetta kann samskipast við tað sekundera heilsuverkið, við grundarlagi í áliti um framtíðar heilsuverk, sum ein arbeiðsbólkur í løtuni arbeiðir við*".

Nevndin í Almanna- og heilsurøktarafelagnum heldur tað vera ógvuliga óheppið, at forkvinnan í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Jana H. Dalsgaard, er sett í hesa nevnd. Havandi í huga, at tað eru nógvir fakbólkar, ið mynda heilsuverkið, er tað óskiljandi, at fakfelagsforkvinnan hjá sjúkrarøktarfrøðingunum skal sita í slíkum bólki og gera álit um framtíðar heiluverkið í Føroyum. Ferð eftir ferð hevur hon alment havt at øðrum fakbólkum í heilsuverkinum. Hon leggur teir millum annað undir ikki at megna at røkja ávísar uppgávur, teir annars eru útbúnir til.

Í sambandi við lógina um heilsuútbúgvingarnar til heilsuhjálpara og heilsurøktara hevur Jana H. Dalsgaard gjørt viðmerkingar, ið tala fyri seg um áskoðan hennara um heilsurøktarar. Í 8 síðu longu viðmerkingunum spyr hon millum annað: "*Er endamálið við at økja heimildirnar hjá heilsurøktarum í enn størri mun, at skifta sjúkrarøktarfrøðingar út við heilsurøktarar ?* ".

Í nýggju lógini fáa heilsurøktarar ikki víðari heimildir, enn teir áður hava havt, og hevði Jana kunnað seg betur um nýggju lógina, hevði hon eisini dugað at sæð hetta. Men viðmerkingarnar benda greitt á, at hon óttast, at heilsurøktarar taka yvir alt arbeiðið hjá sjúkrarøktarfrøðingum. Harumframt mælir Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar í viðmerkingunum, "*frá at seta á stovn útbúgvingina til heilsurøktara* ". Áhugavert hevði tí verið at fingið at vitað, um Jana kann ímynda sær, at heilsurøktarar yvirhøvur skulu starvast í føroyska heilsuverkinum.

Viðvíkjandi útbúgvingini til heilsurøktara kunnu vit upplýsa, at hon er komin ístaðin fyri útbúgvingarnar til sjúkrahjálpara, pleygara, røktarheimsassistent og ítrivsvegleiðara. Hesar útbúgvingar hava vit ikki kunnað fingið í Føroyum, men flestu limir okkara hava nomið sær hesar útbúgvingar í Danmørk. Millum 160 og 180 fólk við áðurnevndu útbúgvingum, og umleið 150 onnur við heilsurøktaraútbúgving úr Danmørk, starvast nú í almanna- og heilsuverkinum her á landi.

Burtur úr rúgvuni av arbeiðsplássum har áðurnevndu fakbólkar starvast, kunnu vit nevna:

- somatiskar og psykiatriskar sjúkrahúsdeildir
- ellis- og røktarheim
- sambýli og dagtilhald

Til tess at lýsa, hvussu ómetaliga vítt heilsuverkið fevnir fakliga, loyva vit okkum her at endurgeva tvey áhugaverd reglubrot, ið eru tikin burtur úr visjónsætlanini:

*"Heilsuverkið er skipað í primera og sekundera heilsuverkið. Tað primera heilsuverkið er í høvuðsheitum kommunulækna-, heilsufrøði- og sjúkrakassaskipanin, apoteksverkið, og viðgerðarstovnar annars, so sum rúsevnisstovnar og umlætting. Tað sekundera heilsuverkið er í høvuðsheitum sjúkrahúsini og serviðgerð uttanlands."*

*"Eftir politiskari og fakligari ætlan verður støðugt arbeitt við at tillaga føroyska heilsuverkið, so vit framhaldandi kunna tryggja føroyingum nøktandi heilsutænastur á so nógvum økjum sum møguligt. Talan er bæði um viðurskiftini innanhýsis á teimum trimum sjúkrahúsunum, millum tey 3 sjúkrahúsini, viðgerðarstøð uttanlands og ikki minst millum tað primera og sekundera heilsuverkið."*

Við støði í viðmerkingunum, ið Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hava um lógina um heilsuútbúgvingarnar, sum snøgt sagt eru skelkandi at lesa, ivast nevndin í Almanna- og heilsurøktarafelagnum stórliga í, um Jana H. Dalsgaard í hesi nevndini megnar at røkja sína uppgávu til fulnar: Nevniliga at síggja allar fakbólkar í heilsuverkinum sum møguligar uppgávuloysarar, og sum eitt tilfeingi í føroyska heilsuverkinum.

Almanna- og heilsurøktarafelagið heitir á tey, ið varða av heilsuverkinum, um at loyva øðrum viðkomandi fakbólkum at vera við í tilrættaleggjanini av heilsuverkinum. Bert soleiðis tryggja vit, at allar eindir í Føroyska heilsuverkinum fáa best hóskandi fakbólkar í starv og harvið brúkt sítt tilfeingi á skilabesta hátt.

# Tríggjar tungur í sama fólkafloksheysi

SUNE
JACOBSEN



Í samband við fyrispurning frá Jørgen Niclasen til Bárð Nielsen um uppbýti av lands- og kommunuskatti stóðst mikil orðadráttur í Fólkaflokkinum. Fyribils gongur flokkurin í trimum bólkum.

Tað hevði verið áhugavert hjá okkum, sum fáast við kommunalpolitikk at vita, hvør myndar flokkin, ella stutt og greitt at fingið at vita, hvat Fólkafloksins politikkur er á kommunala økinum.

**Í bólki 1: Jørgen Niclasen og Óli Breckmann**
**Í bólki 2: Jógvan við Keldu, Heðin Zachariasen og Poul Michelsen**
**Í bólki 3: Anfinn Kallsberg**

Bólkur eitt tekur ikki undir við, at kommunurnar verða savnaðar í størri eindir, og teir taka ikki undir við, at fleiri øki verða løgd út til kommunurnar at umsita. Teir vilja hava umsitingina at liggja í høvuðsstaðnum, har sum hon altíð hevur ligið.. Niðurstøðan hjá hesum báðum var, at kommunurnar brúktu skattaborgarans pening til fjant og fjas. Teir fýltust á, at kommunurnar ikki høvdu sett skattaprosentið niður síðani 1995, sjálvt um teir áttu at vita, at kommunurnar hava yvirtikið peningakrevjandi umráði m.a. barnaansingini, sum als ikki var dagførd. Hesir báðir hava ikki tikið lut í komunalpolitikki nakrantíð.

Í bólki tvey eru gamlir kenningar á kommunala økinum. Eingin ivi er um, at teirra støðu um, at kommunurnar ikki hava minni ábyrgdarkenslu enn landsmyndugleikin til at umsita mál, er eitt vinnaramál í longdini. Men hesir tríggir eru ein minniluti í Fólkaflokkinum.

Í bólki trý situr sjálvur floksformaðurin, Anfinn Kallsberg, sum er meira víðgongdur enn bólkur tvey. Hann heldur at í høvuðsheitum eigur alt at verða lagt út á kommunurnar, so løgtingið í síðsta enda verður eitt løggevandi ting, sum bert krevur skatt inn til at fíggja sína egnu umsiting og umsitingina hjá landsstýrinum. Hesir tankar eru søtur tónleikur í mínum oyrum, men sum eitt stig á leiðini eru tankarnir hjá bólki tvey mest áhugaverdir í dag.

Tí kundi eg hugsað mær at vita, hvør bólkur umboðar Fólkaflokkin á kommunala økinum?

# Føroya Tele í politiskari suppu

SJÚRÐUR
SKAALE



**Skulu tey, sum ikki velja Javnaðarflokkin, nú fara yvir til Kall?**

Jan Müller sá út sum var hann dottin niður av mánanum, tá sjónvarpið tosaði við hann eftir at Sosialurin var settur til sølu. Hann gav hyggjarunum ta fatan, at fráboðanin um søluna kom púrasta óvæntað.

Men Jan spældi sjónleik. Hann visti, at Sosialurin skuldi setast til sølu langt áðrenn tað hendi. Sambært Dimmu kom jú eitt boð upp á Sosialin longu dagin eftir, at hann var settur til sølu. Og tað kann ógvuliga illa vera komið frá øðrum enn teimum, sum eiga blaðið í dag. Hvør annar skuldi havt upplýsingarnar?

Hetta er einki at siga til. Sjálvandi fór sølan fram í samráð við blaðstjórarnar. Alt annað hevði verið løgið. At hann Jan sat og spældi handan sjónleikin, kann heldur ikki kallast skeivt. Tað var í mesta lagi eitt sindur fjákut.

At Javnaðarflokkurin gevur Jan og hansara monnum framíhjárætt at keypa blaðið, er eisini púrasta upplagt og í fínasta ordan.

Tað, sum ikki er í ordan er, at leiðslan á Sosialinum í allari gongdini hevur havt almennu fyritøkuna Føroya Tele sum viðspælara.

**Partísoldátarnir**

At Føroya Tele sambært viðtøkunum als ikki hevur loyvi til at keypa Sosialin, er sjálvsagt álvarsamt – men tað er ikki størsti trupulleikin.

At tað almenna við hesum er við til at keypa upp tað privata, er eisini óheppið, men heldur ikki nakað at missa svøvnin av.

Tað, sum er mest grundleggjandi skeivt í øllum hesum er, at Føroya Tele við síni nýggjastu íløgu beinleiðis stuðlar einum politiskum flokki í Føroyum.

Tí hóast Sosialurin er eitt útmerkað tíðindablað, so er endamálið hjá blaðleiðsluni ikki bara at bera tíðindi. Tað er sanniliga eisini at marknaðarføra Javnaðarflokkin.

Jan Müller og Eirikur Lindenskov eru tað, vit kunnu rópa partísoldatar í Javnaðarflokkinum. Teirra fremsta missión á Sosialinum hevur altíð verið at júka niður í fólk, at Javnaðarflokkurin er best. Einaferð var Fólkaflokkurin tann óndi, og farnu mongu árini hevur Tjóðveldisflokkurin verið tað stóra dýrið. Men Javnaðarflokkurin er altíð best. Eisini tá Javnaðarflokkurin ikki stendur fyri nøkrum sum helst í føroyskum politikki. Á Sosialinum broytist hugsanin ikki – Sverri, Vilhelm, Gerhard og Henrik eru bara svarið!

**Skulu fólk skifta til Kall?**

Nú hava hesir partísoldatar (kanska saman við øðrum starvsfólki) so keypt Sosialin. Og nógv bendir á, at tað áðrenn søluna var avtalað, at teir skuldu hava blaðið.

Hetta er absolutt einki at siga til. Sjálvandi vil Javnaðarflokkurin tryggja sær, at ryggklappararnir sleppa at halda fram. Politiskt sæð hevði alt annað verið vitleyst.

Men líka so vitleyst er tað, at almenna fyritøkan Føroya Tele er við í spælinum.

Tí tað er lítil ivi um, at politiska linjan hjá Sosialinum verður tann sama. Hóast flokkurin ikki longur eigur blaðið og ikki kann geva beinleiðis ordrar, so er loyaliteturin tann sami. Og fingu Jan, Eirikur og hini í veruleikanum einarætt at keypa, standa teir jú eisini í moralskari skuld til flokkin.

Tí er lítil ivi um, at propagandamaskinan fer at koyra sum áður. Úrvalið av politiskum tíðindaflutningi verður sum higartil. Tær javnaðarmissiónsku oddagreinarnar fara sum altíð at renna inn á teldukervi blaðsins frá teimum ymisku skribentunum kring landið.

Í sær sjálvum er tað púrasta í ordan.

Men tað er avgjørt ikki í ordan, at pengar hjá Føroya Tele standa aftanfyri. Tí pengar hjá Føroya Tele, eru pengar hjá Føroya fólki. Og knøpp 80% av Føroya fólki velja ikki Javnaðarflokkin.

Leiðslan á Føroya Tele hevur við hesum gjørt ein fatalan brølara. Hon hevur stoytt ta almennu fyritøkuna niður í eina partapolitiska suppu, har hon als ikki hoyrir heima.

Andras Róin eigur sum skjótast at draga Føroya Tele burturúr aftur hesi suppu. Og tað eigur hann ikki bara at gera av prinsipiellum orsøkum. Tað kann eisini kosta fíggjarliga, ger hann tað ikki.

Teir flestu av hansara kundum hava jú lítlan hug til at stuðla Javnaðarflokkin, tá teir rinda sína telefonrokning. Men tað verða teir nú tvingaðir til.

Tað kundi hent, at nógvir av teimum fara yvir til Kall...